# Nýggjar vindmyllur í Nes haga

**Mánamorgunin komu tær tríggjar vindmyllurnar til landið, sum SEV fer at seta upp í Nes haga. Myllurnar, sum Vestas hevur bygt, komu úr Danmark við Norrønu og vórðu út á fyrrapartin koyrdar heim í Nes kommunu á trailarum**

VINDMYLLUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Henning Jacobsen, verkfrøðingur, væntar, at gongur alt sum ætlað, standa myllurnar uppi um einar 14 dagar ella so.

Hann sigur, at hesar tríggjar vindmyllurnar hava eitt veingjabreiði, sum er 47 metrar í mun til verandi myllu í Nes haga, har longdin úr enda í annan er einar 25 metrar.

- Hesar myllurnar eru 660 kW hvør, meðan verandi mylla í Nes haga er 150 kW.

### 18 milj. krónur

Spurdur, hvussu stór íløgan er – og um hetta er ein góð íløga hjá SEV, sigur Henning:

- Verandi mylla í Nes haga, sum hevur staðið upp í eini 11-12 ár, hevur riggað væl og við teimum royndum, sum SEV hevur gjørt sær við hesi myllu, er væntandi, at íløgan upp á einar 18 miljónir krónur, verður ein hampiliga góð íløga.

Henning Jacobsen sigur, at nýggju myllurnar í minsta lagi skuldu givið einar 7 miljónir (kW) kilowatt tímar um árið, og havandi í huga, at nýtslan í einum vanligum húsarhaldi liggur um 5.000 (kW) kilowatt tímar, svarar orkuframleiðslan hjá nýggju myllunum til nýtsluna hjá einum 1300 húsarhaldum.

### Eystari armur…

Á eystara armi á Skálafjørðinum búgva eini 3.600 fólk tilsamans. Býta vit hetta tal við 3, sum man vera umleið miðaltalið av fólki í hvørjum húsi, fáa vit 1.200 húsarhald. Tað merkir, at nýggju vindmyllurnar hjá SEV í minsta lagi kunnu nøkta el-tørvin hjá øllum húsarhaldum á eystara armi á Skálafjørðinum.

Í hesum einfalda roknistykki er vinnan í økinum ikki tikin við, men bert vanligu húsarhaldini.

Hetta gevur hóast alt eina mynd av, hvussu stór elframleiðslan hjá hesum trimum vindmyllunum kann væntast at verða.



*Veingirnir eru velduga stórir. Úr enda í annan eru teir 47 metrar langir. Hvør mylla er 660 kW í mun til verandi myllu í Nes haga sum er 150 kW*
Mynd: Jens Kr. Vang

## Føroyar ein banantjóð

HEILUR FISKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

- Tað eru ikki vit, sum gera spælireglurnar viðvíkjandi útflutningi av fiski. Tað gera tey, sum sita í Tinganesi. Vit kunnu ikki bara sita hendur í favn – og einki gera.

Soleiðis tekur Birgir F. Kass til, sum starvast á deildini hjá Faroe Seafood í Bretlandi, nú Sosialurin herfyri prentaði eitt skriv, har felagið bjóðar sínum viðskiftafólkum heilan fisk.

- Vit vilja helst virka fiskin í Føroyum, og tað gera vit so sanniliga eisini. Tað er ikki við okkara vilja, at Føroyar í ávísan mun kunnu samanberast við eina banan-tjóð, sum sendir sína rávøru óvirkaða av landinum.

Birgir F. Kass vísir eins og stjórin, Meinhard Jacobsen, á, at nøgdirnar av heilum fiski, sum Føroya Fiskavirking hevur útflutt óvirkaðar, eru forsvinnandi smáar.

- Okkara uppgáva er eins og hjá øðrum keyparum og framleiðarum at tjena pening, sigur Birgir F. Kass.



*Nú sildin er full í æti og ikki er egnað til heilfrystingar, verður gulllaksur frystur á Kollafjord Pelagic. – Men fiskiskapurin hevur verið smáligur í seinastuni, sigur stjórin, Dánjal Jákup Andreasen*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Norðhavssildin full í ætu – frysta gulllaks í Kollafirði

**Á Kollafjord Pelagic verður eingin norðhavssild fryst í løtuni. - Sildin er full ætu, og tá er hon ikki egnað til frystingar, sum tíverri er einasti møguleiki, vit hava í løtuni, sigur Dánjal Jákup Andreasen, stjóri**

KOLLAFJORD PELAGIC
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Dánjal Jákup Andreasen, stjóri á Kollafjord Pelagic, sigur, at á virkinum í Kollafirði hava tey tíverri bert møguleikar til heilfrystingar, og tá ið norðhavssildin nú er full í æti, letur tað seg ikki gera at taka ímóti sild.

Tá ið vit frættu mánamorgunin, hevði stjórin ikki talið við hondina sum sigur, hvussu nógv tons av norðhavssild, tey í hesum umfari frystu, men tað vóru skip, sum høvdu fleiri landingar í Kollafirði.

- Nú skulu vit bara vóna, at sildin fær so nógv at eta í føroyskum sjógvi, at hon verður verandi longri enn undanfarin ár – og soleiðis tekur uppaftur gamla ferðamynstrið.

Spurdur, um sildafiskiskapurin minkaði burtur í einki, áðrenn virkið gavst at taka ímóti, sigur Dánjal Jákup, at tað gjørdi hann ikki.

- Skipini fingu framvegis nakað av sild, tá ið vit góvust at keypa, sigur hann.

### Frysta gulllaks

Um mánaðarskiftið, apríl/mai, tók virkið í Kollafirði ímóti fyrstu nøgdunum av gulllaksi til heilfrystingar.

- Vit hava síðan fryst gulllaks og vóna, at fiskiskapurin fer at roynast í summar og út á heystið.

Dánjal Jákup sigur, at fiskiskapurin hjá gulllaksaskipunum hevur verið heldur smáligur í seinastuni, men vónir eru um, at hann batnar aftur.

Skipini, sum eru á gulllaksaveiði, eru Eysturbúgvin, Vesturbúgvin, Polarhav og Stjørnan.

Stjórin á Kollafjord Pelagic vísir á, at meðan gulllaksur verður heilfrystur í Kollafirði, verður hann virkaður til fars í Leirvík.

- Vit samstarva um gulllaksin, sigur Dánjal Jákup Andreasen á Kollafjord Pelagic.